


# Nærkast nýggjari framleiðslu á Atlantsmótinum

Jan Müller

19.04.2014 - 11:09

Oljan.fo

Um somu tíð sum gjørt verður klárt at bora tveir brunnar á føroyska landgrunninum verða fyrireikingar gjørdar til eina nýggja oljuframleiðslu eystan fyri markið, í bretskum øki. Talan er um Lancaster fundið, sum ætlanin er at byggja út.

Hurricane, sum er fyristøðufelag, upplýsir, at tað hevur leigað pallin Sedco 712 til at bora ein avmarkingarbrunn og testa oljukelduna. Ætlanin var at bora í fjør men orsakað av, at pallurin varð nógv seinkaður, varð avgjørt at bora í ár ístaðin.

Lancaster keldan varð funnin í 2009 og testað árið eftir.

**Oljufelagið Hurricane er bretskt og arbeiðir serstakliga vestan fyri Hetland, har tað enn er einsamalt um síni loyvi. Felagið ætlar at búna og gera møguligar keldur klárar til útbygging, áðrenn tað letur loyvini upp fyri øðrum íleggjarum.**

Sambært DECC, sum er at sammeta við okkara Jarðfeingi, so finst stórur partur av enn ikki funnum oljukeldum í Bretlandi í økinum vestan fyri Hetland. Tølini siga, at her goyma seg upp til 8 milliardir tunnur av olju skrivar Hurricane á síni heimasíðu.

Felagið sigur eisini frá, at tað er partur av komandi útbjóðingarumfari í bretskum øki, har tað serliga fer eftir loyvum millum Hetland og føroyska markið.



